# Friðarligt ársskifti

**Hóast nógv fólk vóru í býnum í Havn nýggjársaftan, so var talan um eitt rættuliga friðarligt ársskifti, verður upplýst á politistøðini í Havn.**

POLITITÍÐINDI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at nakrir smávegis skaðar av fýrverki vóru, men ikki nakað álvarsligt.

### Sum vanligt vikuskifti

Nýggjársaftan var ein bilførari tikin fyri at koyra við kenning í Havn, og hann verður nú ákærdur fyri rúsdrekkakoyring.

Nakað av herverki var eisini, og millum annað var onkur postkassi sprongdur í luftina. Hetta hevur í mong ár verið rættuliga vanligt í grannalondum okkara, at ótangar sprongja postkassar í luftina í sambandi við nýggjárið, og nú sær tíverri út til, at hetta er við at vinna fram í Føroyum eisini.

Tórshavnar Sløkkilið hevði undan nýggjárinum givið loyvi til 80 ymisk bál kring høvuðsstaðin, og sambært løgregluni hava ongir trupulleikar verið av hesum. Vakthavandi á politistøðini sigur, at teir ongar fráboðanir hava fingið um ólóglig ella vandamikil bál, og hann heldur eina orsøk verða, at veðrið var so mikið gott nýggjársaftan.



*Hóast nógv fýrverk var sent nýggjársaftan, so sigur løgreglan kring alt landið, at talan hevur verið um eitt serstakliga friðarligt ársskifti.*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

## Fekk skaða í hondina

Ein ungur maður í Kvívík fekk nýggjársaftan stóran skaða í hondina nýggjársaftan av fýrverki. Skaðin hendi, tá ið ein rakett rakti mannin. Sum skilst kom rakettin bæði í búkin og í hondina á manninum. Maðurin fekk skaða í hondina av rakettini, og hann noyddist á skaðastovuna, har hann bleiv seymaður og fekk fleiri pentur.

Á skaðastovuni á Landssjúkrahúsinum hava tey annars ikki havt tað stóra at gjørt av fýrverksskaðum, og sagt verður, at talan hevur verið um eitt rættuliga friðarligt nýggjár.

**tn**

# 20.000 krónur stolnar

**Náttina til nýggjársaftan var innbrot framt móti handlinum hjá Kaj Andreassen í Brekkutúni í Hoyvík. Tjóvarnir eru farnir avstað við umleið 20.000 krónum í reiðum peningi**

INNBROT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Løgreglan fekk fráboðanina um innbrotið nýggjársaftansmorgun, og innbrotstjóvarnir eru farnir avstað við umleið 20.000 krónum. Eisini eru onkrir aðrir smærri lutir tiknir, og onkur teirra kann hava avgerandi týdning í arbeiðinum hjá kriminalløgregluni í at finna fram til innbrotstjóvarnar.

### Eyðkendir tendrarar

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni, sigur, at í løtuni hevur løgreglan sum so ongar slóðir at ganga eftir, men teir vóna, at fólk kunnu hjálpa teimum við hesum. Hann sigur, at tjóvarnir millum annað hava stolið nakrar eyðkendar eingangstendrarar, sum eiga at verða léttir at kenna aftur.

- Talan er um nakrar klárar eingangstendrarar við áskriftini Hünnebech. Áskriftin er svørt, og tað sama er sjálvt høvdið á tendrarunum. Um foreldur ella onnur leggja til merkis børn, ið hava slíkar tendrarar, vilja vit fegin frætta frá teimum, sigur Bergleif Brimvík.

Leiðarin á kriminaldeildini greiðir frá, at tjóvarnir hava brotið seg inn gjøgnum bakdyrnar í handlinum, og at tað kundi verið líkt til, at talan er um ungfólk, tí holið, sum tjóvarnir eru komnir inn ígjøgnum, er sera lítið, og tað má metast trupult hjá vaksnum fólki at koma inn í handilin gjøgnum áðurnevnda hol.

# Løgreglan einki at gera

**Tað er ikki bert í høvuðsstaðnum, at ársskiftið hevur verið serstakliga friðarligt. Bæði á politistøðini í Runavík og í Klaksvík verður boðað frá óvanliga friðarligum nýggjári**

LØGREGLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Vakthavandi á politistøðini í Runavík segði í morgun, at talan hevði verið um eitt óvanliga friðarligt ársskiti. Løgreglan í Eysturoynni hevði einki havt at gjørt, og ongar fráboðanir høvdu verið um skaða av fýrverki, eld ella nakað sum helst annað.

### Sama støða í Klaksvík

Í næststørsta býnum í Føroyum, Klaksvík, hevur nýggjárið eisini verið sera friðarligt. Vakthavandi á politistøðini sigur, at hann sjálvur hevði vaktina millum nýggjársaftan og nýggjársdag, og telefonin ringdi ikki eina tí einastu ferð, sigur hann.

- Tað hevur einki verið, og um onkur skaði hevur verið av fýrverki, so er tað ikki farið umvegis politistøðina, sigur vakthavandi á politistøðini í Klaksvík.